TING-HELLAN

# Størri áhugi tá ið

## Men tað kunnu vera aðrar orsøkir til, at áhugin fyri fólkatingsvalinum er vorðin størri seinastu árini, eitt nú at fleiri kvinnur bjóða seg fram sum valevni

FÓLKATINGSVALEVNINI
*Jóannes Hansen*



*At valevnini eru so nógv ber við sær, at floksleiðslurnar hava stórar trupulleikar at geva valevnunum ta rúm í miðlunum, sum tey rokna við at fáa, tá ið tey hava latið seg stilla upp*



Tað eru ov nógv valevni á listanum til fólkatingsvalið. Hetta hevur fleiri ferðir verið at hoyrt seinastu dagarnar. Løgmaður tók aftur í aftur hetta valkvøldið í sjónvarpinum og í Sosialinum í gjár. Løgmaður heldur, at valevnini skuldu verið fýra ella fimm, og at talan skuldi bara verið um reell valevni, sum hann tekur til. Harvið verður sipað til, at tað er eingin meining í, at valevni bjóða seg fram, sum longu frammanundan vita, at tey ætla sær ikki á Christiansborg, um tað skuldi komið fyri, at teimum varð víst álit frá veljarunum.

Valkvøldið helt Jógvan Mørkøre í útvarpinum, at landsstýrismenn áttu ikki at havt loyvi at stilla upp. Og ein annar spurningur, sum ivaleyst er nærverandi í hesum sambandinum, er, um tað verður mett at vera hóskandi, at løgtingsformaðurin, sum er formaður hjá øllum Løgtinginum, og sum fær somu løn sum løgmaður, eigur at bjóða seg fram á fólkatingsvalinum.

Orsøkin til hetta tosið er, at tað hevur verið víst á, at tað hesa ferð vóru 107 valevni tilsaman á fólkatingsvalinum í Føroyum, meðan tað vóru færri enn túsund, sum stríddust um 175 sessir í Danmark.

At valevnini eru so nógv ber við sær, at floksleiðslurnar hava stórar trupulleikar at geva valevnunum ta rúm í miðlunum, sum tey rokna við at fáa, tá ið tey hava latið seg stilla upp. Spurningurin er, um sáldið ikki átti at havt verið nýtt frammanundan uppstillingin í staðin fyri at tað verður brúkt í valstríðnum.

Síðani á valinum í 1973 hava allir teir stóru flokkarnir bjóðað seg fram á øllum fólkatingsvalunum. Talan er ikki um støðuga gongd, men talið av valevnum er hækkað so við og við. Í lógini er einki hámark fyri talinum á valevnum. Í seksti árunum vóru valevnini oftast fýra fyri hvønn flokkin, í sjeyti árunum vóru tey umleið eitt fyri hvørt valdømi (7), og síðani er talið hækkað so við og við, inntil tað á seinastu valunum heilt er eskploderað.

Hjálagda talva vísir talið av valevnum hjá hvørjum flokkinum og tilsaman, hvussu nógvar kvinnur hava verið at valt ímillum, og hvussu stór valluttøkan hevur verið. Tilfarið er fingið til vega síðani valið týsdagin. Her er eingin niðurstøða hesum viðvíkjandi. Men her eru tølini, og so ber til hjá áhugaðum at gera sær sínar

### Tal á valevnum og valluttøka

| | A | B | C | D | E | F | O | Íalt | Kvinnur | Valluttøka |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1973 | 4 | 7 | 8 | 8 | 6 | 6 | | 39 | 2 | 54,6 |
| 1975 | 7 | 7 | 8 | | 8 | | | 30 | 1 | 56,4 |
| 1977 | 8 | 7 | 8 | 7 | 7 | 8 | 5 | 50 | 3 | 62,9 |
| 1979 | 8 | 8 | 10 | 8 | 9 | 8 | | 51 | 8 | 65,4 |
| 1981 | 9 | 9 | 9 | 8 | 11 | 10 | | 56 | 7 | 55,4 |
| 1984 | 10 | 8 | 9 | 9 | 12 | | | 48 | 6 | 61,0 |
| 1987 | 12 | 16 | 18 | 10 | 10 | | 10 | 76 | 17 | 68,9 |
| 1988 | 14 | 25 | 17 | 15 | 1 | 15 | 10 | 97 | 14 | 70,3 |
| 1990 | 11 | 17 | 8 | 8 | 11 | 9 | | 64 | 7 | 54,4 |
| 1994 | 11 | 25 | 9 | 8 | 12 | 17 | 3 | 86 | 12 | 62,3 |
| 1998 | 12 | 18 | 16 | 3 | 11 | | | 60 | 13 | 66,1 |
| 2001 | 17 | 26 | 19 | 3 | 20 | | 7 | 92 | 21 | 80,0 |
| 2005 | 22 | 23 | 26 | 7 | 21 | | 10 | 107 | 33 | 72,7 |

### Lutfalsliga atkvøðutalið hjá nr. 1, nr. 1-2 og listanum 2005

| **2005** | A (22) | B (23) | C (26) | D(7) | E (21) | H (10) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nummar 1 | 54,7 | 24,6 | 21,5 | 38,0 | 44,4 | 43,2 |
| Nr. 1-2 | 71,3 | 45,8 | 41,8 | 69,3 | 61,6 | 70,8 |
| Listaatkv. | 2,5 | 11,4 | 6,6 | 6,2 | 3,7 | 10,0 |

| **1973** | A (4) | B (7) | C (8) | D (8) | E (6) | F (6) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nummar 1 | 47,1 | 25,0 | 68,9 | 45,9 | 54,1 | 68,2 |
| Nr. 1-2 | 80,9 | 41,9 | 76,6 | 65,5 | 70,3 | 75,6 |
| Listaatkv. | 7,4 | 17,7 | 6,1 | 10,7 | 6,2 | 5,8 |